*»At hittast á stadion er at rokna sum eitt slag av familjusameining, og tí er altíð fullsett, líkamikið hvør mótstøðan er«*
*Yesim Barlas, Fenerbache*

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

ÍTRÓTTUR

# Til Helvitis fyrst

**Tað eydnaðist ikki at fáa skift um heima- og útidyst, og í morgin fer B36 til Bakgarðin í Helviti, sum Sükrü Saraçoglu ofta verður nevnt**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað eydnaðist ikki B36 at fáa flutt fyrra dystin móti Fenerbache til at verða spældan á Tórsvølli. Á fundi millum B36 og turkiska felagið í gjár, royndi B36 annars nógv fyri at fáa býtt um uppá dystirnar. Serstakliga tí hetta gav betri fíggjarlig útlit fyri føroyameistarnar.

Men royndirnar vóru til fánýtis. Turkisku umboðini hildu staðiliga fast um, at dystarskráin verður tann sama, sum lutakastið lagaði tað til, og longu nú eru leiðarar og spælarar í ferð við at fyrireika seg til ferðina til Bakgarðin í Helviti, sum heimavøllurin hjá Fenerbache, Sükrü Saraçoglu, ofta verður nevndur.

Dysturin her verður spældur mikudagin, 26. juli klokkan 21 lokala tíð, og returdysturin verður so á Tórsvølli tann 1. august klokkan 19.

Útlendsku spælararnir hjá B36 fóru av landinum longu fríggjamorgunin, tí teir skulu á vitjan hjá donsku ambassaduni fyrst, og restin av hópinum fer so avstað leygardagin. Leygarkvøldið verður roknað við, at spælarar, venjarar og leiðarar eru í Turkalandi, og so eru fýra dagar at fyrireika seg til størstu avbjóðingina, ið flestu av spælarunum nakran tíð hava havt.



*Talan er neyvan um nakra hugnaliga uppliving, sum bíðar B36 á Sükrü Saraçoglu í Istanbul*
*Mynd: Scanpix*

### 42.000 áskoðarar

Og roknast kann við, at B36 kemur at spæla fyri so nógv tí størstu fjøldini, sum nakað føroyskt felag hevur spælt fyri.

Vanliga er fullsett á heimavøllinum hjá Fenerbache, sum tekur 42.928 áskoðarar, og sambært turkisku umboðunum, so verður hetta eisini støðan tann 26. juli.

– Hjá okkum er áskoðaramentanin sera sterk. At hittast á stadion er at rokna sum eitt slag av familjusameining, og tí er altíð fullsett, líkamikið hvør mótstøðan er, segði Yesim Barlas, sum tekur sær av flestu praktisku viðurskiftunum í samband við dystirnar móti B36.

Og tað verða neyvan 42.000 tigandi áskoðarar, sum taka ímóti B36 í Istanbul. Gjøgnum árini hava fleiri av evropisku stórfeløgunum ásannað, at talan er um alt annað enn hugnaligar og gestablíðar umstøður á Sukru Saracoglu, og tað er als ikki av ongum, at leikvøllurin hevur fingið sítt eyknevni.

## Nógvir eru úr Formula deildini

Í vikuni eftir ólavsøku verður NM kapping fyri U-17 landslið í Føroyum. Føroyar skulu luttaka bæði við U-17 og U-19 landsliði.

U-17 landsliðið er í hesi vikuni í Aberdeen og luttekur í kapping.

Í dag hava venjararnir hjá U-19 liðnum, Bill Jacobsen og Heðin Askham, boðað frá, hvørjar spælarar teir vilja hava at luttaka í NM kappingini.

Tólv av teimum átjan spælarunum spæla í Formuladeildini, og fleiri av hinum spæla í 1. deild. Uttan iva størsti trumfurin á føroyska liðnum er Christian R. Mouritsen, sum spælir við Manchester City.

Føroysku spælararnir eru hesir: Rógvi Rygshamar, LÍF, Pætur T. Jørgensen, Ólavur í Ólavsstovu og Niklas Eysturoy, HB, Einar Hansen og Bogi Løkin, NSÍ, Sam Jacobsen, GÍ, Jóhan T. Davidsen og Levi Hanssen, Skála, Kristoffur Jakobsen og Mathias Samuelsen, KÍ, Jón Krosslág og Henning Joensen, VB, Johan Ellingsgaard og John Hansen, B36, Frank Poulsen, ÍF, Rasmus F. Nielsen, B71 og Christian R. Mouritsen Manchester City.

Føroyska U-19 landsliðið er í bólki saman við Noregi, Onglandi og Svøríki. Fyrsti dysturin hjá liðnum verður mánadagin 31. juli klokkan 14.30, tá ið Føroyar á niðara vølli í Gundadali skulu spæla móti Noregi.

**-mørk**

## Leikbann og bót til Zidane

FIFA hevur nú tikið støðu til mest umtalaðu hendingina í HM-finaluni millum Italia og Frakland. Hetta tá Zinedine Zidane stútaði Marco Materazzi í bringuna.

Zidane fær fyri hetta leikbann í tríggjar dagar, men nú hann er givin at spæla, hevur hann játtað at arbeiða hetta av sær.

Samstundis hevur Zidane, sum helst eigur nakrar milliónir á bók, eina bót á einar 35 tkr. fyri hendingina. Materazzi fekk tveir daga leikbann fyri at hava provokerað Zidane. Hartil fekk hann eina bót á knappar 25 tkr.

**-mørk**

# Bill skal venja ungdómin á Toftum

**B68 hevur sett 31 ára gamla Bill McLeod Jacobsen sum ungdómsvenjara**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

31 ára gamli klaksvíkingurin hevur í fleiri ár verið partur av venjaraliðnum kring yngru landsliðini hjá FSF, og fyrr í ár hevur hann eisini vant dreingjalið í B36.

Á Toftum verður hann maðurin, sum skal samskipa venjingina kring yngru lið felagsins, og hartil skal hann eisini venja næsta besta liðið hjá B68, sum í ár spælir í 2. deild.

B68-formaðurin Niclas Davidsen sigur, at felagið fegnast um at hava gjørt avtalu við klaksvíkingin.

– Tað er umráðandi fyri felagið at hava ein væl skikkaðan persón, sum hevur høvuðsábyrgdina av allari ungdómsvenjingini í felagnum.

– Vit hava nógvar góðar venjarar, men tað er sera umráðandi at hava ein, sum bæði hevur høvuðsábyrgdina og er førur fyri at geva hinum venjarunum íblástur. Tað hevur sjálvsagt stóran týdning, at umstøðurnar hjá venjarunum eru so góðar sum yvirhøvur gjørligt," sigur Niclas Davidsen á heimasíðuni hjá B68.



*Nýggi ungdómsvenjarin hjá B68 er her avmyndaður í nýggja búna sínum*
*Mynd: www.b68.fo*